# Tunnilin letur upp í november

**26. november klokkan 11 verður undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi alment tikin í nýtslu. Hetta kunngjørdi nevndarformaðurin í P/F Vágatunlinum á tíðindafundi í Vágum í gjár**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Edvard Joensen*



*Klæmint Weihe boðaði á tíðindafundi í gjár frá, at undirsjóvartunnilin verður tikin í brúk tann 26. november í ár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Miðvági:** Tann 26. november klokkan 11 fyrrapartin verður undirsjóvartunnilin tikin alment í nýtslu. Hetta er eitt hálvt ár fyrr enn upprunaliga mett. Upprunaliga ætlanin segði juni 2003, meðan tað endaliga úrslitið nú verður í november 2002

Klæmint Weihe, nevndarformaður í P/F Vágatunlinum hevði stórtíðindi at bera á tíðindafundi á Ellisheiminum í Miðvági í gjár.

Spurningurin um, nær tunnilin verður klárur at taka í brúk, hevur verið á hvørjum munni í Vágum í longri tíð. Eins nógv hevur verið tosað um, hvat tað fer at kosta at koyra undir Vestmannasundi. Men tí spurninginum kundi nevndarformaðurin ikki svara á fundinum, tí kostnaðurin er ikki endaliga avgjørdur enn, segði hann.

Tó er greitt, hvussu sjálv bummskipanin fer at síggja út, greiddi hann frá. Talan verður um ómannaða bummstøð, har gjaldast skal við kortskipan. Bæði vanlig kreditkort og serlig kort til skipanina, fara at verða brúkt.

Roknað verður við, at fólk, sum ferðast nógv og regluliga gjøgnum tunnilin, fara at keypa serligu avsláttarkortini, meðan onnur, sum bara gera onkran túr av og á, kunnu klára seg við sama kortinum, sum tey brúka hjá lokala keypmanninum.

Klæmint Weihe segði á samkomu í samband við, at seinasta skotið í tunlinum varð skotið í januar, at hann væntaði at kunna geva vágafólki eina stóra jólagávur í ár. Tað lyftið heldur hann við at boðað frá, at tunnilin verður klárur tann 26. november.

Hann sigur eisini, at hann hevur alla grund til at halda, at tað fer at verða so. Tí arbeiðið gongur væl, og alt er, sum bendir á, at tað verður liðugt til ta tíð.

Tíðindafundurin á Ellisheiminum varð hildin í samband við, at Miðvágs Fornminnisfelag hevur sett upp eina framsýning um ferðasambandi vestur í Vágar. Framsýningin verður opin um Vestanstevnuna og eisini mánadagin.




## Fiskivinnugransking søkir 3 granskingarleiðarar

Fiskimálaráðið hevur gjørt av at seta gongd á skipaða fiskivinnugransking í Føroyum. Í hesum sambandi verður søkt eftir trimum granskingarleiðarum, sum skulu standa á odda fyri granskingini.

Fiskivinnugranskingin verður skipað í granskingarkjarnar, sum skulu taka sær av hvør sínum nærri lýstum granskingarøki. Hvør kjarni verður fakliga leiddur av einum granskingarleiðara, sum Fiskimálaráðið setur. Kjarnin virkar sjálvstøðugt í tøttum samstarvi við almennan stovn, ið kemur at hýsa granskingini.

Í fyrstu atløgu verður byrjað við trimum kjarnum, har fakligu yvirskriftirnar eru:

**1. Veiði- og reiðskapstøkni**
**2. Virkingartøkni (procesteknologi)**
**3. Evnafrøði/lívtøkni (bioteknologi)**

Samráðingar eru við Fiskirannsóknarstovuna, Náttúruvísindadeildina á Setrinum og Heilsufrøðiligu starvsstovu um at hýsa hvør sínum kjarna.

Granskingarleiðarin skal sjálvur gera innihaldið í granskingini ítøkiligt saman við eini programnevnd. Talan er um at bróta upp úr nýggjum og at finna tann skilabesta leistin, og tískil má granskingarleiðarin tola broytingar í starvssetan – bæði í innihaldi og formi.

Eftir ætlan skulu granskingarkjarnarnir virka upp til trý ár við møguleika fyri at leingja skeiðið til fimm ár. Tá tíðarskeiðið er lokið verður virksemið eftirmett – bæði granskingarliga, vinnuliga og skipanarliga.

**Krøv og ynski**
Vit vænta, at tú
- hevur granskingar eginleikar, ert forvitin og væl skipað/ur
- hevur góð leiðslu- og samstarvsevni
- hevur viðkomandi akademiska útbúgving og eftirútbúgving (PhD ella líknandi)
- hevur hollar royndir innan gransking

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði, sum tú sjálv/ur í stóran mun kemur at evna til og ávirka innihaldið í.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tíðaravmarkað til trý ár við møguleika fyri at leingja setanina upp til fimm ár. Setanin verður eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálaráðið, og arbeiðsstaðurin er sum lýstur omanfyri. Byrjað verður 1. november ella eftir nærri avtalu.

**Umsókn**
Umsókn við CV og tilmælum skal vera samskiparanum í Fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi 10. september 2002. Umsóknin kann vera á føroyskum, norðurlendskum ella enskum máli. Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

Meira fæst at vita við at venda sær til:

**Fiskivinnugransking**
Ásmundur Guðjónsson
Vinnuhúsið
Postrúm 1038
R.C. Effersøesgøta 30
110 Tórshavn

tel 311864
fax 317278
asmundur@industry.fo

SANSIR TEL 355355

FISKIMÁLARÁÐIÐ




# Formaðurin vil ikki dragast inn í málið

**Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, vil ikki so mikið sum hoyra um skuldsetingarnar, sum Tórbjørn Jacobsen hevur ført fram ímóti løgmanni og ráðharrum Fólkafloksins. Høgni Hoydal velur at síggja skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen sum eitt persónsmál, og slík sigur hann seg ikki gera viðmerkingar til.**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*



Formaður Tjóðveldisfloksins hevur verið óvanliga styggur seinastu dagarnar, men í gjár, tríggjar dagar eftir at Tórbjørn Jacobsen setti fram skuldsetingar, sum geva løgmanni grundarlag at stevna honum fyri ærumeiðing, valdi floksformaðurin at taka telefonina, tá fjølmiðlarnir ringdu til hann.

Tað var tó ikki fyri at gera slætt borð ella reinsa luftina, soleiðis sum fyrrverandi løgmaður Jógvan Sundstein eftirlýsti í blaðnum í gjár, at Høgni Hoydal valdi at traðka fram. Heldur var orsøkin, at hann ynskti at greiða frá, hví hann ikki vil gera viðmerkingar til skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen.

### Eitt persónsmál

Grundgevingin, sum Høgni Hoydal førir fram um, hví hann ikki vil gera viðmerkingar til skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen, er greið.

- Hatta er eitt persónsmál, ikki eitt politiskt mál. Og persónsmál geri eg ikki viðmerkingar til. Eg eri ikki við í hasum málinum, sum fjølmiðlarnir fokusera uppá, og eg vil ikki dragast inn í eitt orðaskifti, sum eg als ikki haldi hevur nakað við politikk at gera, sigur Høgni Hoydal, sum ikki metir seg hava hvørki hug, tíð ella orku at taka sær av teimum nógvu persónligu álopunum, sum fara fram í føroyskum politikki,

- Eftir góð fýra ár í politikki havi eg sjálvur upp í ein heilan kassa av blaðgreinum, har lagt verður eftir mær persónliga á allar møguligar mátar, men eg havi ongantíð valt at tikið tað upp í fjølmiðlunum. Eg diskuteri ikki persónsmál, og tað geri eg heldur ikki í hesum førinum.

### Anfinn fær einki svar

Høgni Hoydal metir ikki, at samgongusamstarvið er í vanda av tí sokallaða persónsmálinum.

- Vit eru farin inn í eina samgongu og hava undirskrivað eitt samgonguskjal. So leingi samgonguskjalið verður hildið, havi eg ongan trupulleika. Eg haldi at tað er harmiligt at man í Føroyum altíð fokuserar uppá persónsviðurskifti og mátarnar, sum orð verða søgd uppá. Tí har vita vit, at allir flokkar eru líka góðir.

Anfinn Kallsberg eftirlýsti í grein í Sosialinum mikudagin einari greiðari útmelding frá leiðsluni í Tjóðveldisflokkinum um hvat hennara støða er til tað, sum Tórbjørn Jacobsen hevur ført fram

Men hesa útmelding fer løgmaður ikki at fáa ígjøgnum fjølmiðlarnar, tí formaður Tjóðveldisfloksins vil ikki gera nakrar almennar viðmerkingar til innihaldið í tí, sum Tórbjørn Jacobsen hevur skrivað.

Allir spurningar, sum koma inn á tær skuldsetingar, sum Tórbjørn Jacobsen reisir og tær avleiðingarnar, sum kunnu standast av hesum, í floks- og samgonguhøpi, verða soleiðis svaraðir av floksformanninum við at vísa til at talan er um eitt persónsmál, sum ikki verður kommenterað.

# Gissur og diskokúla í Platform

DANSUR
*Rúnar Reistrup*

Diskotek Platform heldur tað vera upp á tíðina at lata nútíðartónleikin liggja eina løtu, og blaða nakrar síður aftur í gloymibókini eftir tónleiki frá tíðini, tá babba var ungur.

Hetta hendir av og á og kann næstan kvalifisera seg til at verða kallað eitt afturvendandi tiltak á Platform, og í kvøld verður so aftur sonevnt 70'ara kvøld á diskotekinum.

Babbarnir hjá teimum vitjandi á Platform eru ikki so ungir longur, og tað eru plátuvendararnir frá teirri tíðini heldur ikki. Men tað forðar ikki Gissi Patursson fyri at venda aftur til plássið handan plátuspælaran, sum nú er vorðin til fløguspælara. Hann er nevniliga gestafløguvendari í Platform í kvøld, tá diskokúlan verður skrúvað upp undir loftið, og skjúrtuflippurnar vaksa seg breiðar.

# Ráðstevna um grundlógina

**Grundlógararbeiðið skal nú setast í gongd aftur, og tað skal eftir ætlan gerast við einari ráðstevnu um grundlógina í heyst. Tíðarkarmurin fyri arbeiðið verður víðkaður smá fýra ár, nú ferðin á sjálvstýrisleiðini er minkað.**

GRUNDLÓG
*Rúnar Reistrup*

Ætlanin var upprunaliga, at uppskot til føroyska grundlóg skuldi liggja klárt á summri 2000. Men arbeiðið at smíða lógargrundarlagið undir øllum hinum landsins lógum, vísti seg at vera meira umfatandi enn tann tíðin, sum varð sett av til arbeiðið.

Tíðarfreistin fyri grundlógaruppskotið varð tí útsett eitt gott ár, men heldur ikki tá varð grundlógaruppskotið liðugt.

Høgni Hoydal, løgmálaráðharri, ásannar, at fyrsti tíðarkarmurin fyri grundlógararbeiðið var knappur, men heldur fast um, at tað hevði borið til at fingið eina føroyska grundlóg klára til tíðina, um so var, at fólkaatkvøða um føroyskt fullveldi var sum ætlað í farna valskeiði.

- Tá hevði viljin verið til staðar at fingið arbeiðið gjørt. Tað sigur seg sjálvt, at tá einki trýst er á fyri at fáa eitt slíkt arbeiðið liðugt til eina ávísa tíðarfreist, so tekur arbeiðið altíð longri tíð, sigur Høgni Hoydal, løgmálaráðharri.

Nú arbeiðir løgmálaráðharrin við at fáa sett gongd á aftur arbeiðið at smíða eina føroyska grundlóg, eftir at alt hevur ligið stilt í eina tíð. Formaðurin fyri grundlógarnevndina, Jóan Pauli Joensen, er biðin um at halda fram í formanssessinum, og nú verður arbeitt við at útvega nevndini betri arbeiðsumstøður og at broyta mannagongdir, soleiðis at arbeiðið kann glíða lættari.

### Ongan skund

Sum er metir løgmálaráðharrin ikki, at grundlógararbeiðið hevur nakað at skunda sær til.

- Í løtuni er eingin meiriluti í tinginum fyri at hava eina fólkaatkvøðu um fullveldi. Tí hevur grundlógararbeiðið ongan skund. Men grundlógararbeiðið eigur ikki at steðga av teirri orsøk. Nú mugu vit heldur brúka tíðina til at fáa innihaldið í grundlógini út til almennar hoyringar, sigur Høgni Hoydal.

Ein stórur partur av uppskotinum til føroyska grundlóg er longu skrivaður, og hendan partin vil løgmálaráðharrin hava út til hoyringar beinanvegin.

Í hesum sambandi hevur hann tikið stig til at fyrireika eina almenna ráðstevnu um grundlógina, har ætlanin er at meinigi maðurin skal sleppa at siga sína hugsan um landsins grundleggjandi lóggávu. Ráðstevnan verður eftir ætlan í heyst.